FØÐINGAR

5. des. fingu Poula Næs og Rúni Thomsen, Eiði, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3350 gr.

5. des. fingu Sólrun Krosslá og Jens Petur Brattalíð, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 3780 gr.

11. des. fingu Anngerð og Niels Pauli Hammer, Hvalba, ein son. Hann var 56 cm. og vigaði 4200 gr.

12. des. fingu Elin og Jørleiv Syderbø, Húsar, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4000 gr.

12. des. fingu Jóngerð og Absalon Heinesen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3425 gr.

12. des. fingu Margreth Augustinussen og Eyðun Holm, Vágur, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3800 gr.

13. des. fingu Tórunn Jacobsen og Dan Olsen, Hósvík, ein son. hann var 53 cm. og vigaði 3450 gr.

13. des. fingu Astrid Hammer og Stiig Andersen, Vestmanna, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 3100 gr.

14. des. fingu Súsanna Mortensen og Jón Rói Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3500 gr.

14. des. fingu Elisabeth og Svein Eliasen, Viborg, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 4020 gr.

Eg kom til verðina 14. des. var 53 cm. og vigaði 3950. Foreldur míni eru Arnóra Dímun Persson og Anfinn Leivsson Hansen, Tórshavn.

16. des. fingu Eyðhild Christiansen og Hans Esbern Fuglø, Argir, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3350 gr.

16. des. fingu Eileen Jacobsen og Heri Dam, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4200 gr.

16. des. fingu Borghild og Atli Hentze, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. og vigaði 3050 gr.

17. des. fingu Anna Hammer og Kári Mikkelsen, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm.og vigaði 4200 gr.

17. des. fingu Betina Egholm og Georg Haraldsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. og vigaði 4150 gr.

17. des. fingu Charlotte og Ragnar M. Egholm, Albertslund, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 3100 gr.

18. des. fingu Jacobina og Finnleif Fagradal, Sandur, ein son. Hann var 53 cm.og vigaði 3950 gr.

18. des. fingu Unn Dam og Páll av Teiginum, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3600 gr.

18. des. fingu Laila Winther Saxov og Eyðun Karbech Mouritsen, Argir, ein son. Hann var 60 cm. og vigaði 3900 gr.

19. des. fingu Rósely og Jóanes Hansen, Miðvágur, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 4175 gr.

Hjalmar, Ólavur, Teodor og Bogi fingu eina lítla fitta systur 23. sept. Her er hon uml. 3 vikur gomul og tá ið hon var fødd vigaði hon 5150 gr. og var 58 cm. long. Hon eitur Petra. Foreldur hennara eru Thordis Reynstind og Óli Larsen og tey búgva í Brøndby Strand.

TILTØK

Gudstænastur
4. sunnudag í advent
Vestmanna: kl. 12, Marjun Bæk
Hósvík: kl. 12, altarg., Inga Poulsen Dam
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argir: kl. 11, Bergur D. Joensen
Gøta: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Fríðrikskirkjan: kl. 16, Sanggudstænasta við luttøku av kirkjukórinum undir leiðslu av Mikael Johan Heinesen
Christianskirkjan: kl. 11, Hans Eiler Hammer
Kunoy: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Viðareiði: kl. 12, altarg., Elsa Funding
Gjógv: kl. 12 messa, Emil Olsen
Havnar kirkja: kl. 11, Sverri Steinhólm
Kaldbak: kl. 12, Bjarni Bæk
Sandavágur: kl. 12, David Johannesen
Søldarfjørður: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Vágur: kl. 11, og **kl. 16** jólakonsert við Ljómi og solistum, Marianne Telling
Sandvík: kl. 12 Ólavur Rasmussen

Jólaaftan
Norðradalur: kl. 13.30,
Vesturkirkjan: kl. 15,
Argir: kl. 17, Bergur D. Joensen
Vesturkirkjan: kl. 17,
Argir: kl. 15, Heri Joensen
Havnar kirkja: kl. 15, donsk gudstænasta,
Hvítanes: kl. 17, Bjarni Bæk
Havnar kirkja: kl. 17, Sonja Klein
Hvannasund: kl. 16,
Viðareiði: kl. 17, Elsa Funding
Hósvík: kl. 15.30,
Kvívík: kl. 17, Marjun Bæk
Vestmanna: kl. 16 og 17.15 Inga Poulsen Dam
Bønhúsið í Øravík: kl. 15, Jónsvein Bech
Hov: kl. 11,
Hvalba: kl. 12.30 Ólavur Rasmussen. Talvan gongur til frama fyri kirkjuna
Sandvík: kl. 14,
Leiti: kl. 16 Ólavur Rasmussen
Christianskirkjan: kl. 17, Hans Eiler Hammer
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 14, *Árnafjørður:* kl. 17, Niels Pauli Danielsen
Norðskála: kl. 17, Emil Olsen
Fríðrikskirkjan: kl. 17, Martin R. Jacobsen
Sandavágur: kl. 17, David Johannesen
Glyvrar: kl. 16,
Rituvík: kl. 17.15, Meinhard Bjartalíð
Fuglafjørður: kl. 16,
Leirvík: kl. 17.15, Uni Næs

Jóladag
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argir: kl. 11, Sverri Steinhólm
Havnar kirkja: kl. 11, Hans J. Joensen, biskupur
kl. 18: Bjarni Bæk
Kaldbak: kl. 18, Sonja Klein
Kirkjubøur: kl. 12, Bergur D. Joensen
Vestmanna: kl. 12, Bjarni Bæk
Viðareiði: kl. 12,
Hvannasund: kl. 17, Elsa Funding
Kollafjørður: kl. 12,
Kvívík: kl. 17, Petur Martin Rasmussen
Tjørnuvík: kl. 12,
Haldórsvík: kl. 17, Børn syngja; talvan gongur fyri sunnudagsskúlan, Marjun Bæk
Saksun: kl. 11,
Hvalvík: kl. 12,
Langasandur: kl. 14,
Sørvágur: kl. 17, Inga Poulsen Dam
Fámjin: kl. 12,
Tvøroyri: kl. 17 Jónsvein Bech
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen. Talvan gongur fyri Emmaus
Kunoy: kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
Eiði: kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa
Gjógv: kl. 17,
Funningur: kl. 18.30,
Eiði: kl. 20, Emil Olsen. Talvan gongur fyri missiónshúsið Kármel
Gøta: kl. 12, Talvan gongur fyri kirkjuna
Æðuvík: kl. 16,
Nes: kl. 18, Martin R. Jacobsen
Miðvágur: kl. 12,
Bøur: kl. 17, David Johannesen
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Sjóvar kirkja: kl. 12, Effata synur, talvan gongur fyri missiónshúsið. Niels J. Nielsen
Elduvík: kl. 12,
Funningsfjørður: kl. 16,
Fuglafjørður: kl. 18, Uni Næs

2. jóladag
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Hvítanes: kl. 17, Bjarni Bæk
Havnar kirkja: kl. 17, Sonja Klein
Nólsoy: kl. 12, Sonja Klein
Hestur: kl. 12, Heri Joensen
Kirkja: kl. 15,
Hattarvík: kl. 17, Elsa Funding
Kvívík: kl. 12, Marjun Bæk
Kollafjørður: kl. 12, Inga P. Dam
Øravík: kl. 12, altarg., Jónsvein Bech
Christianskirkjan: kl. 11, altarg., barnagudstænasta kl. 15,
Norðoya Vistarheim: kl. 19.30, Hans Eiler Hammer
Mikladalur: kl. 12, altarg.,
Húsar: kl. 15.30
Norðskála: kl. 11.40, kl. 12 messa, Emil Olsen
Gøta: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Sørvágur: kl. 12, David Johannesen
Selatrað: kl. 12, Niels J. Nielsen
Hellurnar: kl. 12, Uni Næs

Lívdin
Samkoman Lívdin hevur familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti, kl. 12.00 hvønn sunnudag í Hoyvíkar skúla. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.

Katólska kirkjan
Gudstænastur á jólum í Mariukirkjuni:
Mánadagin 23. kl. 17.30 Messa í Kerit.
Týsdagin 24. kl. 07.40 Messa í Kerit.
Jólanátt kl. 00.00 Miðnáttarmessa í kirkjuni.
1. jóladag kl. 11.00 Hámessa í kirkjuni
2. jóladag kl. 11.00 Messa í kirkjuni
Friggjadagin 27. kl. 11.00 Messa í Kerit
Leygardagin 28. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin 29. kl. 11.00 Hámess aog barnadópur í Mariukirkjuni, kl. 14.30 Jólaveitsla fyri børnini.
Nýggjársdag kl. 11.00 Hámessa og kl. 17.00 Takkarguðstænasta.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Hornorkestrið spælir jólatónar í Dr. Jacobsensgøtu fríggjadagin kl. 18.00 í Gongugøtuni leygardagin kl. 11.00 og mánadagin kl. 19.00.
Sunnudagin kl. 11 Møti.
Jólaaftan kl. 17.00 Jólagudstænasta.
1. jóladag kl. 9.00 Jólatónar við Landssjúkrahúsið, kl. 11.00 Hátíðarmøti, Palli Petersen talar.
2. jóladag kl. 16.00 Jólaveitsla fyri alla familjuna.
Sunnudagin 29. kl. 17.00 almenn jólaveitsla fyri vaksin. Treingja tygum koyring, ring 227599.
31. des. kl. 23.00 Midnáttargudstænasta.
Nýggjársdag kl. 18.00 ársins fyrsta møti. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00
Sunnudagsskúli, kl. 16.30
Syngja barnakórini uttanfyri Ebenezer og kl. 18.00 Sangmøti í Ebenezer.
Jólaaftan kl. 15.00 Barnamøti.
Jóladag kl. 18.00 Útisetamøti.
2. jóladag kl. 18.00 Sjómansmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Sunnukvøldið 22. des. kl. 18.00 Møti v/ Poul Johannesen, Kvinnutrio syngur. Eykainnsavnan verður til Heimamissiónina.
2. jóladagur kl. 18.00 Møti v/ Tummas Thomassen, Teir 4 syngja.
Sunnukvøldið 29. des. kl. 18.00 Møti við Niels Juel Olsen, Gittit syngur.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi í Brekku 3
Sunnudagin kl. 11.00 Útsendingargudstænasta, aftaná verður ábit.
Jólaaftan kl. 15.00 Gudstænasta.
2. Jóladag kl. 12.00 Gudstænasta.
Sunnudagsskúlin er í jólafrí, byrjað verður aftur 12. januar. After Eight er í jólafrí, byrjað verður aftur í januar.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17.00 Landsbøn.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18.00 Evangel. møti.
Jólaaftan kl. 16.00 Jólagudstænasta.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Eingin sunnudagsskúli í jólafrítíðini.
Sunnudagin 29. desember kl. 10.30 Morgunmøti.
Sunnudagin 5. januar kl. 10.30 Morgunmøti, kl. 15.00 Barnaveitsla.
Heimasíða: www.hebron.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

Rhema á Hálsi
Onki møti verður sunnudagin. Jólaaftan syngja vit jólini inn kl. 16.00. Sunnudagin millum jól og nýggjár verður møti kl. 17.00. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

Saron,Vestmanna
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
2. jóladag kl. 11.00 Morgunmøti. Øll eru vælkomin.
Telefonandaktin 424 741.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Egin Toftegaard og Henning Hansen. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin 22. des. verður jólatræ fyri børnum undir skúlaaldur kl. 15.00, í skúlaaldri kl. 19.00. Jólafestin fyri tey vaksnu verður í Ítróttarhøllini sunnudagin 29. des. kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Gøta
Jóla og Sjómansfestin verður í kirkjukjallaranum sunnukvøldið 22.12. kl. 19.00, Malmberg Olsen av Strondum verður við. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og møti kl. 18.00. Ungdómsmøtini hava jólahald kl. 21.00.
Jólaveitslan hjá Thabor verður leygardagin 28. desember kl. 19.00 fyri vaksin og sunnudagin 29. desember fyri børn. Kl. 15.00 fyri børn undir skúlaaldri og kl. 17.00 fyri børn í skúlaaldri.

Siloa, Fuglafirði
Jólasangløta við Siloa-kórinum verður í Siloa sunnukvøldið kl. 20.30. Eisini syngur sangbólkurin »Salt«. Drekkamunnur verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

Getsemane, Klaksvík
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti og kl. 16.00 Sunnudagsskúli (jólafest). Tú ert hjartaliga vælkomin.

Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 16.00 Sangmøti í Betania.
Mikudagin – 1. jóladag kl. 12.00 Familjumøti. Verið hjartaliga vælkomin.

TILTØK

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18.00
Innsavnan til húsið. Jólafestin fyri børnini verður leygardagin 28. des. Børn undir skúlaaldur kl. 16.00. Børn í skúlaaldri kl. 19.00. Hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti við jólahugna verður leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 16.00 verður jólatræshald fyri børn í øllum aldri.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18.00 við Terja, Hallur og Mouritz. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betania, Porkeri
Á fundinum sunnudagin kl. 18.00 talar Poul Færø. Sangluttøka verður við kórinum.

Missiónshúsið í Vági
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
1. jóladag kl. 18.00 Evangel. fundur
2. jóladag kl. 18.00 Evangel. fundur.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadagfríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og føleg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319130/61 655400.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Hósdagin 2. januar 2003 kl. 10.30-11 Fimnleikur,Sonja Danielsen
Fríggjadagin 3. januar kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.

ANDLÁT

11. desember
Jógvan Jallur Henning Højgaard, 68 ár.

12. desember
Hans á Fløttunum, úr Miðvági, 73 ár.

13. desember
Ellen Nielsen, Frederiksberg, 84 ár

14. desember
Esmar P. Lamhauge, búsitandi í Florida, 87 ár

15.desember
Jóannes Elias Heinesen, ættaður úr Skúvoy, 71 ár

18. desember
Fanny Petersen, í Klaksvík, 94 ár.
Vilhelm Nielsen, Sandavági, 90 ár

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

»Tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávid staði«
Luk. 2. 11

Gott at tað eru einglaorð, ið minna okkum um hetta. Annars høvdu vit ivaleyst gloymt tað. Tí vit halda so nógv av tí lítla Jesusi. Tá ið klokkurnar kalla í kirkju á jólum, streyma fólk úr øllum ættum. Teimum dáma so væl hin lítla Jesus. Hann er so avhildin, har hann liggur í krubbuni í Betlehem. So leingi, hann liggur har, vilja vit fegin fara við stillum sinni, sum hirðarnir til barnið inn. Alt er so vakurt, sum sagt verður um hann, og tað besta er, at hann sjálvur einki sigur. Barnið í krubbuni generar ongan. Vit fáa so góðan frið at gera okkum okkara egnu tankar um hann.

Men so kemur ein eingil og órógvar okkum. Beint meðan vit droyma so vakurt um lítla barnið í krubbuni, kemur hann og sigur við okkum, at hetta barn er Harri. Tann tanki, vit vanliga fara so lætt um, um vit í heilatikið fáa hann við, hann setur eingilin tjúkka striku undir, bæði fyri at vit skulu leggja merkið til tað og ikki gloyma tað. Jesus er Harri. Frelsarin er komin fyri at gerast Harri okkara. Hann skal vera kongur og stjórna ríki sínum.

Jóhannes doyparin, sum eigur tekstirnar inn undir jól, hevði skilt hvør Jesus var. Hann gjørdi tað, vit eiga at gera nú. Hann vísti burtur frá sær sjálvum og peikaði á Jesus. Hann vildi ikki at tað skuldi koma at snúgva seg um hann, tá ið hann visti, at tað var Jesus, alt snúði seg um. Hann eigur at vaksa, eg eigi at minka. Tað er sannleiki. Alt annað er ikki satt.

Latum okkum bara nú á jólum boyggja knø við krubbuna. Fátækur er hann, sum kann lata vera. Men latið okkum hava í huga tað, ið eingilin minnir okkum á, at hetta barn er komið at stýra okkum frá tí trónu, vit til okkara egnu vanlukku alt ov leingi hava sitið á. Tí Kristus er Harri.

Gleðilig jól. Amen!

John S. Myllhamar

E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaðí er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Føroya Heimavirksifelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

PRÓGV

Benjamin Jacobsen, Vatnsoyrar, hevur lokið prógv sum jarðfrøðingur á Københavns Universitet.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Jólaaftan: Fuglafjørður, tlf. 44 40 30
Jóladag: Skála, tlf. 44 14 90
2. jóladag: Runavík, tlf. 44 70 10

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

BRÚDLEYP

Í dag, leygardagin kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Mimi Steintórsdóttir og Jan Otto Straagaard Holm, bæði úr Fuglafirði. Veitslan verður fyri innbodnum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

í dag, leygardagin kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni Klara á Kósini og Petur Martin Solmunde, bæði úr Klaksvík. Veitsla verður fyri innbodnum kl. 19.00 í Skálanum.

Leygardagin 28. desember kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Siri R. Petersen og Rógvi Hansen. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 17.00. Opið hús verður í Kvinnufelagshúsinum eftir kl. 21.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 28. desember kl. 14.00 giftast í Christianskirkjuni Metha Sunnrid Dahl úr Klaksvík og Árant Gotfred Berjastein úr Fuglafirði. Døgurði verður fyri innbodnum á Muntra í Fuglafirði kl. 17.00.

Leygardagin 28. desember kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Paula Sólheyg og Sjúrður Klakk. Veitslan verður í Skálanum fyri innbodnum.

SILVURBRÚDLEYP

Mánadagin 30. desember hava Noomi og Jákup Magnussen silvurbrúdleyp. Tey, sum vilja gleða silvurbrúðarparið eru vælkomin á Reynsgøtu 17 á Argjum sunnudagin 29. desember frá kl. 15.00.

Týsdagin 7. januar hava Ester og Jákup Mikkelsen silvurbrúdleypsdag. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. januar kl. 19.00 í Betesda í Klaksvík. Tey, sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi sunnudagin 29. des. á tlf. 456951, 215340 ella 212241.

Leygardagin 11. januar 2003 hava Julianna og Joen Jacob Winther, Skopun, verið gift í 25 ár. Veitslan verður hildin í Samljóð kl. 19.00. Tit, ið vilja gleðast saman viðokkum, vera biðin at siga frá á tlf. 361139 áðrenn 29. des.